## DAGSINS MEINING

# Vinnumálastýrið sæð sítt kall

Man heldur seg hava sæð alt, men so hendir aftur okkurt so margháttligt, at man fattast orð. Føroya Tele hevur fingið at vita frá Fjarskiftiseftirlitinum, ið er stovnur undir Vinnumálastýrinum, at teir ikki kunnu geva avsláttur til Vinnumálastýrið, tí teir ikki hava eina góðkenda avsláttarskipan. Vinnumálastýrið ger so ikki mætari enn keypir telefontænastur frá einum øðrum veitara, ið hevur ein avsláttarskipan, ið Fjarskiftiseftirlitið undir Vinnumálastýrinum hevur góðkent. Við øðrum orðum noktar Vinnumálastýrið Føroya Tele at bjóða eina avsláttarskipan og velur so ein annan veitara, tí hann hevur eina avsláttarskipan.

Kapping kann verða góð, men tað má verða kapping á jøvnum føti. At uppfinna eina skipan, har landsfeløg ikki fáa somu treytir sum teir privatu ber ikki til. Ei heldur ber til at forera linjukapasitet til teir privatu til undirprís, tí skulu privatar fyritøkur brúka netið hjá Palliba, so skulu tær gjalda ikki bara kostnaðin, men so sanniliga eisini viðlíkahald og endurnýggjan.

Tað er ikki framúr effektivt, tá eitt stýri einsamælt fer út og velur ein veitara á eitt nú teleøkinum. Hettar er ein uppløgd tænasta, ið kann verða keypt inn sentralt frá einum veitara fyri alt tað almenna, ið kann veita allar tænastur frá fastnet í Mykinesi til fartelefoni í Froðba. Ein so stórur kundi sum Føroya Landstýri kann ivaleyst fáa mongdaravsláttur, um Vinnumálastýrið væl at merkja gevur loyvi.

Ansast má eftir, at man við skeivregulering ikki ger, at tað almenna situr eftir við privatkundum á útoyggj, meðan privatir, væl hjálptir av Vinnumálastýrinum, fara avstað við vinnukundum á stórplássum.

Vinnumálastýrið hevur ikki nógv ár á baki og hevur havt fólkafloksministarar gjøgnum stórt sæð alt sítt lív. Væl vitandi, at Fólkaflokkurin helst sá eina demontering av øllum yvirskotsgevandi á landsstovnum, so tykist tað løgið, at eitt stýri sum Vinnumálastýrið, ið sjálvsagt ikki hevur nakra politiska meining um ting skulu vera privat ella ikki, ber so soleiðis at uttan at ráðføra seg við onnur stýri um eina eventuella felags loysn.

Illvilji móti einum almennum stovni ella kanska almennum stovnum í allari almindiligheit eigur ikki at forða fyri einari samlaðari loysn fyri telefontænastur fyri alt tað almenna. Tað er hvørki liberalt ella rættvíst at forða almennum partafeløgum og stovnum í at brúka sínar stórdriftsfyrimunir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hoyrdu tygum sendingina?

"Hoyrdi tú hasa sendingina í dag?" spyr stundum onkur – ella "Hevur tú lisið bløðini í dag?", og hetta er sjálvandi, tá ið okkurt serligt hevur verið umrøtt.

Í fjør setti Vestegnens Zoneterapiskole lýsing í bløðini, har sagt varð frá skeiði í zoneterapi, ið fór at byrja tá og tá. Vit vóru nøkur, ið meldaðu til, og so leið at teirri tíð, at skeiðið skuldi byrja. Sera spennandi at vita, hvussu hetta nú fór at verða!

Fyrst í september sótu vit til reiðar á skúlabonki, ymisk í sinn og skinn, ymiskt, hvussu aldurin var, men hin mikið umrødda viðgerðin, zoneterapi, hevði hugtikið øll, henda alternativa viðgerðin, sum hon verður nevnd, hóast hon var til, langt áðrenn »hvítir kitlar« sóu dagsins ljós.

Undirvísari var Øjvind Solbakk, og at hann hevði hegni til at undirvísa, var øllum greitt longu frá fyrstu stund – og tann niðurstøða var sanniliga hin sama, tá ið skúlagongdin var av árið eftir, og øll vórðu avmyndað við prógvi í hond.

Men hvat bar nú hetta prógv í sær?

Og nú er at spyrja, um tygum hava lisið bløðini og lurtað – ella kanska øvugt, tí tað var ein skelkandi sending í RÁS 2 hin 16. mai í ár, sum ger, at hetta verður fest á blað.

Skúlagongdin kravdi sjálvandi bæði orku og tíð, men øll vóru tó samd um, at úrslitið var stríðið vert, og væl tað.

Tá ið so liðugt er, og ein so smátt hugsar um at fara at gera nakað við tað, ið komið er burturúr, kemur sendingin í Rás 2. Ein, ið hevur virkað latið fólk fáa zoneterapi í eitt áramál frammanundan, fer rættiliga illa við Vestegnens Zoneterapiskole og næmingum hansara. prógvið er snøgt sagt einki vert. Eitt lítið brot úr samrøðuni í »Rás 2« ljóðar so:

Men tað stutta av tí langa er, at tann útbúgvingin (tann, ið Vestnegnens Terapiskole stendur fyri) er for vánalig, og tað, sum eg hugsi um, tað er tað, at brúkarin skal kunna seta nøkur krøv, tað er so nr. 1, og vit hava eingi krøv í Føroyum útyvir tað, at tað er Toll- og Skatt, sum krevur nakað ávíst, fyri at viðkomandi verður MVG-frítikin, tá ið viðkomamdi fer at arbeiða, men tað merkir ikki, at viðkomamdi ikki kann arbeiða, tvs., at vit fáa eina rúgvu av fólki út at virka sum zoneterapeutar, men nú skal tað sjálvandi ikki virka, sum at tú – at eg tvingi teg til at leggja eftir nøkrum, men liggur ikki ein vandi í fyri brúkaran, at viðkomamdi ikki hava nóg góða útbúgving?

Jú, og tí vil eg til tykkum í Føroyum, sum kundu hugsað tykkum zoneterapiviðgerð: Hyggið eftir og spyrjið um, um viðkomandi er viðurkendur av FDZ!! Tí teir zonneterapeutar, sum lúka hesi minnimum krøv í Føroyum, ein í Suðuroy, 3 í Havn, Petra og Ragnhild, og tær lúka allar treytirnar hjá FDZ! Og tað er ein viss trygd fyri brúkaran, at viðkomandi ER veruligur zoneterapeutur.

Og tað er virkiliga synd fyri hesi fólkini, sum ganga á henda skúlan og halda, at tey fáa fullfíggjaða útbúgving, og so vísir tað seg, tá ið saman um kemur, at tað er tað ikki.

Tú, haldi eg, brúkti myndina, tá ið tú fórt í ein hýruvogn, tá setti tú eitt krav.

Ja, og tað er tað minsta kravið, eg seti til ein hýruv.før., tað er, at hann hevur eitt koyrikort – og at ein skipari hevur pappírir, sjálvt um, at tað ikki sigur mær so nógv, um eg hugdi at skiparapappírunum, men tað svarar til at koyra í einum bili, ja, við ongum skili… ja, eg veit ikki, hvussu, man skal siga.

Her verður sipað til prógvið, vit fingu eftir lokna skúlagongd, og má standa fyri rokning hennara, ið eigur orðini.

Altso: Vit, ið hava fingið prógv og ætlandi fara at virka sum zoneterapeutar verða mett javnt við at leiga ein hýruvogn við sjafføri, ið hevur ikki fingið koyrikort.

Hetta, halda vit, kann ikki standa óátalað. Hava strevast eitt heilt ár og fáa slíkan dóm í almennum fjølmiðli? Hvussu kunna fólk hava álit á okkum sum virkandi zoneterapeutar, tá ið ein »erfarin« dama á sama øki letur slík orð falla?

Rokningina fyri tey fer hon sjálv at fáa, og hvussu hetta mál spælir av, er í løtuni ókunnugt. Rætturin fer at tala seinni, hvat úrslit hann so fer at koma til.

Men vit vilja reinsa hetta runublakið av okkum. Vit fingu fyrstu løtu neyvar upplýsingar um tímatal og MVG og annars øll viðurskifti skeiði og møguligum virki eftir, at skúlin var lokin. Og prógv okkara gevur rætt til at virka sum zoneterapeutar á jøvnum føti við aðrar zoneterapeutar!

Tað, ið tykist ørkymla, er, at vit sum virkandi zoneterapeutar ta fyrstu tíðina verða noydd at gjalda MVG.

Hvat tað skal hava við vantandi kunnleika at gera, er kanska ikki øllum greitt. Vestegnens Zoneterapiskole er ein altjóða viðurkendur skúli. Undirvísingin fór fram innan altjóða fastløgdar rammur. Vit arbeiddu miðvíst – eftir altjóða forskriftum, sjálvandi, og tá ið nú sami skúli aftur fer undir nýtt skeið, skal eingin, ið ætlar at søkja, setast aftur. Betri undirvísing enn hana, vit hava fingið, fær neyvan nakar nakrastaðni.

Tað kenst sárt í »Rás 2« verða hunddálkað og sammett við ein hýruvognssjaffør við ongum koyrikorti ella skipara, ið siglir, men hevur ikki skiparaprógv.

Sera ósmæðið og lítið umhugsað, halda vit, at siga soleiðis. Skúli okkara – og harvið undirvísing og undirvísari hava øll tey 25 árini, hann hevur virkað, havt altjóða góðkenning.

Tann, ið við slíkum ósannindum tykist vilja leggja fót fyri okkum, nú vit í smáum vóru hugað at fara til verka, ger ivaleyst mikið fortreð í fyrstu atløgu. Samstarv, sum kanska kundi komið upp á tal, kann illa verða talan um, og ein spurningur er, um tað á nakran hátt hevði gagnað, tí slíkt ger, at tað verður bæði læst og fyri bundið.

Tann, sum í almennum fjølmiðli ber út ósannindi, kann rokna við at fáa mótmæli, og tá ið sendingin í »Rás 2« so ruddiliga vrakaði og niðurgjørdi okkara skúlagongd, ið – sum áður sagt – fór fram eftir fastløgdum altjóða krøvum, vilja vit ikki bara mótmæla, men mótmæla harðliga!!

Ikki meiri frá okkara síðu um hetta mál, hóast seinasta orðið ikki enn er sagt. Rætturin fer at tala seinni, tí Vestegnens Zoneterapiskole hevur stevnt. Og er tað løgið?

Men tað stutta av tí langa er, at tann útbúgvingin (tann, ið Vestnegnens Terapiskole stendur fyri) er for vánalig, og tað, sum eg hugsi um, tað er tað, at brúkarin skal kunna seta nøkur krøv, tað er so nr. 1, og vit hava eingi krøv í Føroyum útyvir tað, at tað er Toll- og Skatt, sum krevur nakað ávíst, fyri at viðkomandi verður MVG-frítikin,

*Framhald á síðu 29*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



**Landssjúkrahúsið**
FR-100 Tórshavn

# Sjúkrasystir

Á **B6** er fast starv sum sjúkrasystir í blandaðum vaktum á starvsbrøki 0,7 leyst at søkja til setan 1. oktober 2001 ella eftir avtalu.

Deildin tekur ímóti innkallaðum og akuttum sjúklingum. Hon hevur 18 seingjarpláss og hevur hesar sergreinar:

- gastroenerologi
- neurologi
- endokrinologi
- onkologi
- hæmatologi

Vit arbeiða eftir kontaktpersónsskipanni.

Vit søkja eftir sjúkrasystir, ið hevur

- hug til at menna seg innan hesar sergreinar
- góð samstarvsevnir
- positiva menniskjaáskoðan
- áhuga fyri at vegleiða teimum lesandi

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Helenu Dahl Olesen, deildarsjúkrasystir á telefon 31 35 40, lokal 106 ella Ásu Poulsen, yvirsjúkrasystir, lokal 300 ella e-post asap@ahs.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 21. september 2001 kl. 14.00

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2377
P/F Selberg, 380 Sørvágur.

Viðtikið 15.06.2001 at lækka partapeningin við kr. 300.000,00 til kurs 100 til at seta í grunn, eftir at proklama er runnin.
Nýggj adressa: Box 180, 600 Saltangará
Nevnd:
Farin úr nevndini: Valdimar Andreas Simonsen, 380 Sørvágur (formaður), Birgir Jákup Michelsen, 380 Sørvágur, Eyðun Løwendal Rasmussen, 380 Sørvágur, Marius Mathias Andreas Thomasen, 380 Sørvágur og Anfinn Hentze, 380 Sørvágur.
Innkomin í nevndina: Bjarti Mohr, V. U. Hammershaimbsgøta 36, 100 Tórshavn (formaður) og Jónsvein Knudsen, 600 Saltangará og Jón Niclas Johannesen, 655 Nes, Eysturoy.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Poul Arni Jacobsen, 380 Sørvágur.
Innkomin sum stjóri: Jónsvein Knudsen, 600 Saltangará.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn
Innkomin sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 4. september 2001

Kristin Balle

# Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella allar tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

**Eind 1:** **Heilsufrøðilig viðurskifti** **18. og 19. september 2001**
**Eind 2:** **HACCP** **1. og 2. oktober 2001**
**Eind 3:** **Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum** **16. og 17. oktober 2001**

**Málbólkur:** Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk, ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

**Undirvísarar:** Serfrøðingar í innaneftirliti

**Stað:** Hotel Føroyar í Havn, byrja verður allar dagar kl. 9.00
**dag 1 í hvørjari eind verður hildið á til kl. 21.00**
**dag 2 í hvørjari eind verður hildið á til kl. 17.00**

**Skeiðskostnaður:** Kr. 3.500 (4.000 við gisting) fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum).

**Próvtøka:** Skipað verður fyri próvtøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið.

**Fráløran fevnir m.a. um:**
Småverulívfrøði, framleiðsluumhvørvi, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.

Freistin at boða frá luttøku er **10. september 2001**. Tilmelding fer fram við at senda ella faxa innskrivingarseðilin til Hotel Føroyar, við Oyggjarvegin, 100 Tórshavn. Telefax nummarið er 316019. Til ber eisini at ringja til Hotel Føroyar tlf. 317500 og boða frá luttøku. **Tilmeldingin er bindandi**. Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96 · 350 Vestmanna
Tlf. 424573 · Fax 424428
Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo

✂

**Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti**

**Eind 1:** ___ **Set kross** **Eind 2:** ___ **Set kross** **Eind 3:** ___ **Set kross**

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Almenn framsýning

Bygdasavnið í Nes Kommunu letur upp almenna framsýning, sum lýsir brot úr skúlasøguni frá 1845 fram til 1958 í gamla prestagarði á Nesi leygardagin 8. september kl. 15.00.

Opið er leygardagar **kl. 15.00 - 18.00** og sunnudagar **kl. 15.00 - 17.00** fram til oktober mánaða.

**Nevndin**

# Brúktar byrsur



**Nógvar góðar brúktar byrsur á goymslu**

**P/f *Jógvan Weihe***
**Heil & smásøla**
**Staravegur 15**
**Box 1008 Tórshavn**
**Tlf. 313897**

# Bilur til sølu



Vælhildin Opel Corsa Swing, árg. mai 1998, til sølu. Motorur: 1,4 – 16 V. 90 HK. Hevur bert havt ein eigara, ikki roykjari. Hevur koyrt 26.000 km. Komið og roynið bilin og gevið eitt boð!

**Ring tlf. 311395 í arbeiðstíð**
**ella tlf. 313186 eftir kl. 18.00**